ítróttur

Nr. 153 • týsdagur • 16. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kanónirnar eru vendar móti Kypros

**Ongantíð áður hevur framrættaði parturin av landsliðnum sæð so tungur út, sum hann ger tað undan uppgerðini, har møguleikarnir at vinna eiga at vera størri, enn teir higartil hava verið í hesi undankappingini**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjár hittuast landsliðsspælararnir at fyrireika seg til landsdystin mikukvøldið. Meiri enn helmingurin av spælarunum koma úr útlendskum feløgum. Teir hava allir sína søgu at siga, og saman við vinmonnunum, sum framvegis spæla heima á landi, hava teir nógv at tosa um og siga frá.

Úr Noregi og umvegis Keypmannahavn komu Todi Jónsson og Atli Danielsen. Úr Danmark komu Gunnar Nielsen, Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum, Johan Byrial Hansen og Súni Olsen, Claus Bech Jørgensen kom úr Onglandi, og úr Íslandi komu Rógvi Jacobsen og Símun Samuelsen. Tað vil við øðrum orðum siga, at tíggju av teimum nítjan, sum í gjár hittust á Hotel Føroyum, og sum eru farnir undir fyrireikingarnar til avbjóðingina móti Kypros mikukvøldið, eru útisetar.

Tað fór sum eldur um norska og danska fótbóltsheimin og sjálvandi eisini kring Føroyar, tá ið Todi Jónsson leygarkvøldið við tíggju tumma seymi staðfesti, at tað skal roknast við honum, og at fótbóltsáhugaðir føroyingar kunnu rokna við størri tyngd í álopspartinum móti Kypros, enn broddurin hevur verið á landsliðnum í fleiri ár.

Todi Jónsson varð tikin av vøllinum, tá ið tað restaði ein hálvur tími. Tom Nordlie, venjarin hjá Start, heldur ikki, at Todi enn er førur fyri at spæla allar 90 minuttirnar, men hann var framúr væl nøgdur við tað, sum føroyski álopsspælarin hevði avrikað, og tað er væl skiljandi.

Start vann 5-2 á trettan faldu meistarunum úr Rosenborg. Todi skoraði eftir lítlum hálvum tíma trý mál, og harafturat var hann orsøk til, at norski landsliðsmálverjin, Espen Johnsen, varð rikin av vøllinum fyri hevnisøku.

Todi skoraði til 2-0, 3-0 og 4-0. Øll málini skoraði hann eftir returbóltar frá málverjanum og verjuni, og í øllum førunum vóru málini í eyðkendum stíli fyri sannar miðframherjar, sum í røttu løtuni eru á rætta staðnum, og sum í knappari vend reagera upp á møguleikan.

- Eg eri sjálvandi fegin um, at vit havdu týdningarmiklu uppgerðina móti Rosenborg, og tá ið tú ert keyptur til eitt felag fyri at vera álopsspælari og harvið at skjóta mál, so er tað sjálvandi sera kærkomið at skora trý mál. Tað er langt síðani seinast, at eg gjørdi trý mál í landskappingini á hesum støðinum, staðfestir Todi Jónsson, sum gleðir seg at spæla móti Kypros.

- Eg havi í meiri enn eitt ár longst eftir aftur at spæla á landsliðnum. Eg havi eina ferð síðani saman við liðfeløgunum verið á Svangaskarði og fyrireikað meg til landsdyst. Ta ferðina gekk ikki so væl. Nú vóni eg, at tað fer at ganga betri. Eg kenni meg vera sera væl fyri, og nú verður tað spennandi at hitta liðfelagarnar. So fáa vit at síggja, hvørjir teir fyrstu ellivu fara at vera, sigur Todi Jónsson.

At Todi Jónsson verður millum teir fyrstu ellivu er eingin ivi. Spurningurin er heldur, hvør skal spæla saman við honum í álopinum. Í tí útgávuni, sum hann var at síggja leygarkvøldið kann tað væl hugsast, at hann eisini hevði verið boð til pláss á norska og danska landsliðnum. Men nú eru tað Føroyar, sum eiga sovornar álopstrumf. Norska pressan fleyt yvir í positivum lýsingarorðum sunnudagin, og tað vóru eisini fleiri dømi um, at Todi ikki er gloymdur í Danmark, hóast hann tey bæði seinastu árini í FCK ikki fekk møguleika at vísa, at tað framvegis er dugur í honum.

Donsku bløðini skrivaðu sunnudagin, at tað var Todi, som sænkede kriseramte Rosenborg.

Fleiri boð eru upp á álopsfelagar til Toda Jónsson.

Andrew av Fløtum hevur verið rættuliga sannførandi í teimum fyrstu umførunum í næstbestu donsku deildini. Hann hevur verið í landsliðsálopinum tær seinastu ferðirnar. Í hvussu so er tveir og kanska tríggir ella fýra aðrir møguleikar eru til hetta plássið. Ein teirra er Christian Høgni Jacobsen, sum leygarkvøldið var rættuliga væl upplagdur og skoraði bæði NSÍ málini móti HB. Og so er møguleiki fyri, at teir báðir, sum í gjár komu úr Íslandi, kunnu spæla í álopinum.

Rógvi Jacobsen hevur spælt í KR álopinum. Sunnukvøldið, tá ið KR á heimavølli vann 1-0 á ÍBV, var Rógvi tó á beikinum. Hann varð settur á miðvøllin, tá ið tað restaði eitt korter.

Símun Samuelsen hevur síðstu tvær vikurnar rættuliga gjørt um seg í Keflavík. Hann hevur ikki spælt í vikuskiftinum. Keflavík skuldi í gjárkvøldið spæla á heimavølli móti Váli.



*Todi Jónsson var dagsins maður hjá norska oddaliðnum Start, tá ið teir leygardagin vunnu 5-2 á meistaraliðnum Rosenborg. Todi gjørdi eitt reint hattrick í fyrra hálvleiki, og lítið er at ivast í, at hann fer at teljast millum teir fyrstu ellivu á føroyska landsliðnum móti Kypros mikukvøldið á Svangaskarði.*

*Mynd: Nicolai Prebensen, VG*

# Skála helt seg hava verri fyritreytir

**B36 dysturin hóskvøldið halda skálamenn darva minni enn hálvskaddu Skála spælararnir, sum ikki høvdu verið førir fyri at venja, og B36 stríðsmaðurin ásannar, at teir tóktust hava meiri orku, sum dysturin leið**

SKÁLA-B36
*Jóannes Hansen*

Tað kundi kanska hugsast, at skálamenn vóru harmir um, at tað ikki hevði eydnast teimum at halda tørn um tvey mála leiðsluna, sum teir høvdu í 1. hálvleiki. Tað vóru teir á heimaliðnum eisini, men ikki púrasta.

- Vit høvdu møguleikan at økja til 3-0, og um tað hevði havt eydnast, so hevði tað helst verið øðrvísi 2. hálvleikur, enn tað bleiv. Men vit eru ikki misnøgdir. Sannleikin er tann, at vit høvdu ikki so gott mót undan B36 vitjanini, tí fyritreytirnar hjá okkum vóru so vánaligar, sigur Pauli Poulsen, hjálparvenjari, og hann útgreinar, hví hann heldur, at teirra fyritreytir vóru verri, enn tær vóru hjá B36, sum spældi strævnan UEFA Cup dyst hóskvøldið:

- Í vikuni vóru fýra av okkara spælarum so mikið illa fyri, at teir ikki vóru førir fyri at venja. Talan var um Nenad, Rúna Rasmussen, Arnhold Berg og Iulian Florescu. At teir kortini megnaðu at spæla, ber við sær, at vit hava mót um, at teir nú eru um at koma fyri seg aftur. B36 hevði alt sítt fólk tókt, og teir kundu seta ómóðar og stinnar spælarar á vøllin síðstu løtuna. Eg haldi ikki, at tað kann sigast, at teir vóru illa fyri, og tað sást heldur ikki á avrikinum hjá teimum. Serliga í 2. hálvleiki stóðu teir seg sera væl, heldur Pauli Poulsen.

## Málið gav eyka orku

Klæmint Matras var ein av B36 stríðsmonnunum, sum var við at venda slagnum, soleiðis at eitt stig fekst burturúr.

- Vit løgdu væl fyri fyrstu minuttirnar. Teir skoraðu fyrstu ferð teir vóru í nánd av málinum. Vit góvu teimum fyrra málið, og hetta setti seg eina løtu í okkum. Vit vóru hepnir, at teir ikki hesa løtuna øktu til 3-0. Men umskipingini av okkara liði tóktist hjálpa væl. Tá passaðu vit betri til teirra spælskipan, og vit fingu fatur á teimum aftur. Málið hjá Oby lyfti okkum upp, vit fingu eyka orku, og síðstu løtuna var um reppið, at tað vóru vit, sum vunnu. Vit halda, at dómarin átti at havt bríkslað fyri brotssparki til okkara, tí tað sá út til, at hann vardi við arminum á strikuni, heldur Klæmint Matras.

Tit høvdu meiri orku enn teir?

- Kanska er tað eisini tí, at vit høvdu meiri at taka av. Fyri aðru ferð á rað varð Oby innskiftur og skoraði mál. Tað hevði sera stóran týdning, heldur B36 stríðsmaðurin.